

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 09 - 2011

# Nógv olja og nógv gass eftir í Norðsjónum

Fleiri stór og smá olju- og gassfeløg hava fingið hug á danska partinum av Norðsjónum. Dreymurin er at finna tann stóra brunnin og milliardirnar Tey seinastu árini hevur tað ljóðað fleiri ferðir, at um stutta tíð er eingin olja og einki gass eftir í Norðsjónum ella í hvussu er tí danska partinum. Men øll eru ikki sannførd um, at tann metingin er røtt. Tvørturímóti halda fleiri feløg, at við nýggjari tøkni ber til at finna nógva olju og nógv gass afturat undir havbotninum. Í Nordsøfonden, sum eigur 20 prosent av øllum teimum nýggju loyvunum, vænta tey sær nógv burtur úr Norðsjónum í komandi árum. Peter Helmer Steen, stjóri, sigur við Børsen, at grunnurin er virkin í økinum saman við 20 stórum og smáum feløgum. Hann vísir á, at av níggju boringum hava átta givið úrslit, og at tað má sigast at vera sera hugaligt. Virksemið fer at veksa nógv tey næstu 5- 10 árini, tí vit hava fingið staðfest, at nógv olja og gass eru eftir í tí danska partinum av Norðsjónum, sigur Peter Helmer Steen við Børsen. Hann nevnir sum dømi, at eitt lítið svenskt felag hevur funnið eina leið, sum er so mikið stór, at har er nóg mikið av gassi til at nøkta alla ta donsku nýtsluna í eitt ár. Talan er um 26 milliónir tunnur av olju ella 4,3 milliardir rúmmetrar av gassi. Við verandi gassprísi er virðið oman fyri 10 milliardir krónur, og gongst sum ætlað, fer framleiðslan í gongd í 2015.